


Uni L. Hansen, samskipari, Jákup Andreas Arge, myndamaður og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Miðlahúsinum til forpremieruna

Ferðin til Føroya í sambandi við tiltakið á ólavsøku var tann fyrsta hjá Thomas Bjørn Tingstrup, ið er annar av tveimum stovnarum av Substanz Nordisk Film. Tá verkætlanin varð sjósett, var tað hin stovnarin av Substanz, Troels Uhrbrandt Rasmussen, ið vitjaði oyggjarnar. Felagið hevur framleitt líknandi útgávur í bæði Danmark, Noregi, Svøríki og Finlandi. Men sambært Substanz stjóranum er »Føroyskar Søgur« nakað heilt serligt.

– Tað var ikki ordiliga fyrr enn á ólavsøku, at tað gjørdist mær greitt, hvussu nógv hendan verkætlanin hevur at týða fyri føroyingar. Útgávur okkara í øðrum londum eru væl móttiknar, tí søgurnar vóru góðar og tí at frásøguhátturin var nýggjur og spennandi. Men í Føroyum miðla vit ikki einans søgur – her eru vit við til at gera ein mun. Allir teir filmar, ið eru innsavnaðir og yvirspældir í sambandi við verkætlanina, eru ein einastandandi møguleiki fyri at leggja lunnar undir eitt tjóðsavn við søguligum livandi myndum, sum ikki finst í Føroyum í løtuni. Tað haldi eg er feitt at fáa høvi taka lut í, staðfestir ein eldhugaður Thomas Bjørn Tingstrup.

## Modellin Armgarð

Ferðin til Føroya var eisini øðrvísi upp á ein annan máta fyri Substanz stjóran.

– Tað er fyrstu ferð, eg havi hitt SO nógv fólk, ið hava persónligar upplivingar við fólki frá einari av okkara útgávum. Bara undir felagssanginum og -dansinum á ólavsøku, prátaði eg við fimm fólk, ið antin eru við í »Føroyskar Søgur« ella hava samband við onnur, ið eru á filmunum. Tað bleiv veruliga stórt, sum tað



*Nógv folk varð samankomið í Miðlahúsinum til forpremieru av "Føroyar Søgur", har Uni L Hansen og Thomas Bjørn Tingstrup greiddu frá*